

## MÁLARI / ARBEIÐSMAÐUR

**Vit sóknast eftir arbeiðsmanni, at mála/sproyta, at byrja skjótast til ber á timburframleiðslu okkara á Vatnsoyrum.**

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi starv
- tryggar arbeiðsumstøður
- gott arbeiðsumhvørvi

**Løn:**
- løn sambært avtalu

**Vit vænta av tær:**
- at tú ert ágrýtin og nærlagdur
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert fyrikomandi, álítandi og støðufastur

Nærri fæst at vita við at venda sær til Fróða á 22 36 56 ella á frodi@hdygd.fo

H-DYGD

Í Geilini 2 | FO-385 Vatnsoyrar | Tel.: +298 332177 | www.hdygd.fo | post@hdygd.fo

*Vatnsoyra Snikkaravirki pf. og Føroya Gluggi pf. eru systurfeløg, og hava felags navn og umsiting. Vit framleiða vindeygu og hurðar úr træ, træ/alu og plast. Í løtuni eru 24 starvsfólk harav 9 eru í timburframleiðsluni.*

REPROZ







www.sosialurin.fo

## ÚTFERÐ Í STAKKIN



**Um viðrar, verður skipað fyri útferð tann 9. og 23. juli kl. 14.00**

**Kostnaður: Vaksin 300 kr**
**Børn 150 kr**

**Tilmelding á telefon**
**22 18 73 - 42 34 01 - 42 33 57**

**Stakksnevndin í Tjørnuvík**

Klaksvíkar Kommuna | Tekniska Umsiting



## Útbjóðing

**Fyri Klaksvíkar kommunu verður arbeiðið í samband við umbygging av svimjihøllini 2. byggistig hervið boðið út alment.**

**Arbeiðstøkurnar eru:**

1. **Betongarbeiði**
2. **Múraraarbeiði**
3. **Membranarbeiði**

Útbjóðingartilfarið fæst frá mánadegnum 10. juli við at gjalda kr. 5.000,- í veð á konto 9865-2000452 í Norðoya Sparikassa í seinasta lagi **mikudagin tann 12. juli** og venda sær til Preben Hansen, ráðgevandi verkfrøðingar við váttan um, at upphæddin er goldin.

Boðini skulu vera í afturlatnum brævbjálva, merktur:

**"Umbygging av svimjihøllini 2. byggistig"**

Boð skulu latast inn til Klaksvíkar kommunu:

**Nólsoyar Pálsgøta 32**

í seinasta lagi 16. august kl. 14.30, ella við lisitatiónina, ið verður sama dag, kl.15.00 í býráðshøllini. Boðini verða tá latin upp, og kunnu tey, ið boðið hava vera hjástødd.

**Projektleiðsla og berandi konstruktiónir**
SP/F PREBEN HANSEN
Ráðg. verkfr.
Argjaboðagøta 7, FO-160 Argir
Tlf. 31 20 25 – Fax 31 00 87

**Arkitektaarbeiði**
FUGLØ ARKITEKTAR
Gerðagøta 12, FO-700 Klaksvík
Tlf. 45 78 87 - Fax 45 78 97

**HVS, ventilatión og reinsiverk**
SP/F Martin E. Leo
Ráðg. verkfr.
Tórsgøta 24, FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 14 88 – Fax 31 54 88

**El-innleggingar**
ODDBJØRN VÁGSLÍÐ
EL – Anlegg
Á Brekku 1, FO-700 Klaksvík
Tlf. 45 53 74 – Fax 45 78 74

Klaksvíkar Kommuna | Nólsoyar Pálsgøta 32
FO-700 Klaksvík | Tel. 410000 | Fax. 410001
klaksvik@klaksvik.fo | klaksvik.fo

creo 458006

SUNDA KOMMUNA

## Varaleiðari til Dagstovnin við Stórheygg í Hósvík

Sunda Kommuna søkir eftir varaleiðara til dagstovnin at byrja tann 15. august 2006 ella eftir nærri avtalu.

Starvið er 35 tíma starv.

Dagstovnurin er skipaður sum ein felags eind við børnum frá 0 til 10 ár.

**Vit ynskja, at umsøkjararnir:**
- hava hug til, saman við leiðara og starvsfólki, at seta námsfrøðina í hásæti við at gera endamálsorðingar og annað í hesum sambandi,
- vilja skapa trivnað fyri børn og vaksin á stovninum,
- hava virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og foreldrunum.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran, Honnu Thøgersen, tlf. 255788.

Umsóknir við avriti av prógvi v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 24. juli 2006 og skulu sendast til:

Sunda Kommunu
Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
400 Oyrarbakki.

Dagstovnurin við Stórheygg í Hósvík er ein av trimum dagstovnum í Sunda Kommunu. Dagstovnurin er normeraður til 58 børn, hevur eitt ár á baki, og har eru í løtuni 11 starvsfólk. Dagstovnaleiðararnir á økinum, tvs. í Hósvík, á Oyrarbakka og í Hvalvík, hava eitt gott og tætt samstarv í samráð við kommununa.